*Jette Gottlieb, Eindarlistin*

# Fólkatingið fer ikki at leggja forðingar

*Framsøgufólkið hjá Eindarlistanum í føroyskum viðurskiftum væntar, at niðurstøðan av kjakinum í Fólkatinginum í dag verður, at tingið samtykkir frágreiðingina frá stjórnini og setir eina nevnd at fylgja við samráðingunum.*



*Jette Gottlieb, Eindarlistin*

Sveinur Tróndarson

– Fólkatingið fer ikki at binda stjórnina og Nyrup niður. Tað verður gjørd ein samtykt, men tað verður ikki ein hvøss samtykt, sum fer at avmarka rásarúmi hjá forsætismálaráðharranum.

Hetta sigur Jette Gottlieb, sum er framsøgufólk hjá Eindarlistanum í føroyskum viðurskiftum.

Hon vísir á, at trupulleikin við málinum er, at tað enn ikki er fastlagt, hvussu samráðingarnar skulu halda fram, og tí ber illa til at samtykkja nakað, men hon væntar ikki, at fólkatingið fer at leggja føroyingum forðingar um so er, at teir ynskja fult sjálvstýri.

Løgmaður hevur annars havt á orðið, at hann er bangin fyri, at Nyrup ætlar at fáa eina bundna uppgávu frá Fólkatinginum, sum ger, at hansara politiska rásarúm í samráðingunum við føroyingar verður sera avmarkað.

Hesari meting tekur Jette Gottlieb ikki undir við.

– Framsøgufólkini hava ikki tosað saman um málið og tí vænti eg einki av hasum slagnum, sigur hon.

– Eg vænti, at fólkatingið góðtekur frágreiðingina frá Nyrup, samstundis, sum ein nevnd verður sett at fylgja við samráðingunum.

Annars heldur Jette Gottlieb, at tað er rætt av landsstýrinum at kunna fólkatingslimirnar áðrenn fundin í morgin.

– Tað er eitt sindur óvanligt, at ein stjórn kunnar eitt ting, men í hesum føri havi eg einki ímóti tí av teirri orsøk, at tinglimirnir hava brúk fyri upplýsingum um viðurskiftini. Sjálv havi eg lisið hvítbókina og samráðingaruppleggið, men eg taki fegin móti fleiri upplýsingum frá landsstýrinum, sigur hon at enda.

Hon skoytir kortini upp í, at úrslitið av fundinum í dag eisini verður ávirkað av føroysku tinglimunum.

– Teirra partur í viðgerðini fer eisini at hava sína ávirkan, sigur Jette Gottlieb at enda.





*Kirsten Jacobsen, Frælsið 2000:*

# Nyrup heilt av leið

*– Framferðarhátturin og uppskotið hjá stjórnini til samtyktar er heilt burturvið, sigur Kirsten Jacobsen, sum sigur, at hennara flokkur fer at atkvøða ímóti uppskotinum. – Hatta sømir seg ikki einum siviliseraðum forsætisráðharra, men er kortini so typiskt Nyrup, sum hon tekur til*

Sveinur Tróndarson

– Vit atkvøða ímóti uppskotinum hjá stjórnini til samtyktar tí tað sømir seg ikki tinginum at samtykkja hatta uppskotið, sigur Kirsten Jacobsen.

Hon er - sum vanligt - sera boysin í orðum, tá hon umrøður danska forsætisráharran og framferðarhátt hansara.

– Tað er ófatuligt. Hvørja tí einastu ferð, hann skal gera okkurt, sum viðvíkur Føroyum, so fer hann buldrandi fram uttan fyrilit og tað er milt sagt ósømiligt fyri ein forsætisráðharra, sum - um hann vil tað ella ikki - eisini er forsætisráðharri føroyinga, sigur hon.

Kirsten Jacobsen sigur, at tað eftir hennara tykki er heilt burturvið, at leggja føroyingum harðar treytir við í sambandi við ynski um størri sjálvræði.

– Tað eru føroyingar, sum hava biðið um størri sjálvræði, og tí eiga vit eisini at vera sømilig í okkara atburði móti føroyingum og veit føroyingum usmtøður, sum gera, at búskapurin ikki skramblar saman. Tí havi eg gjørt eitt uppskot, sum eg eri vís í, hevði verið



*Kirsten Jacobsen, Frælsið 2000*

samtykt, bæði í Føroyum og í Danmark og tað má vera endamálið, sigur Kirsten Jacobsen.

Hon vísir á, at úrslitið av, at føroyingar biðja um sjálvstýrið er, at danski skattgjaldarin sparir pening og tað eigur Nyrup eisini at síggja tað skilagóða í.

– Men hann ger beint øvugt. Hann hóttir føroyingar við stuttari skiftistíð, men vera teir verandi, so fáa tað teir vilja hava. Og tað merkir, at milliard eftir milliard verður send til Føroya, og tað er einki høpi í, sigur Kirsten Jacobsen, sum sigur, at endamálið eigur at vera, at føroyski búskapurin kann venja seg við nýggju umstøðurnar samstundis sum útlit eru til, at danski skattgjaldarin sleppur undan at gjalda.

Hon heldur, at Nyrup ístaðin átti, at niðurfryst skuld føroyinga í fimm ár fyri síðani at gera eina avdráttarskipan, samstundis, sum ein skiftisskipan verður gjørd fyri ríkisveitingina í sjey til tíggju ár.

– Hesi skipan haldi eg flestu flokkar í Fólkatinginum høvdu tikið undir við, tí tá tosa vit um virðilig viðurskifti, sigur Kirsten Jacobsen

Hon var annars ikki so forlipt í kunningarfundinum hjá landsstýrinum í gjár.

– Prinsippielt eri eg ímóti, at landsstýrið kunnar fólkatingið, tí tað er ikki røtt mannagongd, men eg skilji teir kortini, tí fólkatingslimirnir verða ikki kunnaðir av stjórnini, staðfestir Kirsten Jacobsen.

– Men parlamentarisk hevði tað verið rættari um flokkarnir í løgtinginum sendu síni framsøgufólk at kunna starvsfelagarnar í fólkatinginum, sigur Kirsten Jacobsen, sum kortini leggur afturat, at hon sjálv ætlaði sær at lurta eftir landsstýrinum.

*Ulla Tørnæs, Vinstri:*

# Varislig samtykt

*– Semjan, sum verður gjørd í dag, verður ein staðfesting av, at tað eru føroyingar, sum sjálvir avgera sína framtíð. Samstundis taka vit frágreiðingina frá stjórnini til eftirtektar, sigur Ulla Tørnæs, framsøgufólk hjá Vinstra í føroyskum viðurskiftum*

Sveinur Tróndarson

– Vinstriflokkurin hevur leingi sagt, at tað eru føroyingar, sum avgera sína framtíð og hetta verður eisini tað, sum verður samtykt í dag, men kortini dylja vit ikki fyri, at vit heldur enn fegin lata ríkisfelagsskapin halda á.

Tað, sigur Ulla Tørnæs, framsøgufólk hjá Vinstra í føroyskum viðurskiftum.

Hon sigur, at føroyingar onga orsøk hava at óttast fyri, at danska fólkatingið fer at mana spøkilsir úr fortíðini framaftur, m. a. við at krevja av stjórnini, at hon leggur eitt alternativt uppskot fyri føroyingar.

– Hóast vit vilja hava ríkisfelagsskapin at halda fram, so eru tað føroyingar, sum hava avgerandi orðið at siga, tá til stykkis kemur.

Stjórnin leggur í dag eina frágreiðing um samráðingarnar við føroyingar fyri fólkatingið og Ulla Tørnæs roknar avgjørt við, at henda frágreiðing verður tikin til eftirtektar.

– Uppskotið til samtyktar gongur út uppá, at vit staðfesta ynski føroyinga, samstundis sum vit taka frágreiðingina frá Nyrup til eftirtektar. harafturat setir fólkatingið so eina 21 mans stóra nevnd, sum skal fylgja samráðingunum og tað er í stuttum tað, sum hendir í dag, sigur Ulla Tørnæs.

Hon viðgongur, at teirra ynski um at varðveita ríkisfelagsskapin fellur saman við ynskinum hjá andstøðuni í Føroyum, men hon staðfestir samstundis, at tað er semja millum landsstýrið og stjórnina um at samráðast út frá sáttmálauppskotinum.

– Hetta mugu vit staðfesta. Men vit fara ikki at binda Nyrup niður, til nakað sum helst, tí er tíðin farin frá sigur hon. Hann fær



*Ulla Tørnæs, Vinstri*

breiða undirtøku fyri at samráðast við føroyingar um sjálvsstýrið, men har verður ikki innbygd nøkur hóttan um, at danska stjórnin skal hava eitt alternativt uppskot til føroyingar, sigur hon.

Ulla Tørnæs hevði ongar viðmerkingar til kunningarfundin hjá landsstýrinum í gjár, tí hon fór ikki á fundin.

– Til tað havi eg ongar viðmerkingar.

**Lesið eisini tíðindi á www.sosialurin.fo**



# Løgmaður finst harðliga at Lærarafelagnum

*- Eg kann á ongan hátt góðtaka, at eitt fakfelag ger spurningin um at játta pengar til eina lóg til ein part av lønarsamráðingunum. Tá tekur Lærarafelagið í veruleikanum Føroya Løgting av ræði sum játtandi myndugleika. Tað ber ikki til sigur løgmaður*



*At Lærarafelagið átekur sær ein leiklut, har tað skal trýsta eina eykajáttan ígjøgnum í tinginum er einki minni enn fullkomin ørskapur, sigur ein bersøgin løgmaður*

Jan Müller

Anfinn Kallsberg, løgmaður hevur onga ætlan um at leggja seg út í trætuna millum Lærarafelagið og landsstýrið. Tvørturímóti bakkar hann skúlamálaráðharran og fíggjarmálaráðharran fult upp.

- Eg kann á ongan hátt góðtaka, at eitt fakfelag ger spurningin um at játta pengar til eina lóg til ein part av lønarsamráðingunum. Tá tekur Lærarafelagið í veruleikanum Føroya Løgting av ræði sum játtandi myndugleika. Tað ber ikki til sigur løgmaður og vísir á, at um fakfelagið hjá lærarunum nú er vorðið játtanarmyndugleiki í hesum landi, so eru vit fullkomiliga úti í eini anarkistøðu. At Lærarafelagið átekur sær ein leiklut, har tað skal trýsta eina eykajáttan ígjøgnum í tinginum er einki minni enn fullkomin ørskapur.

Hetta er tað sama sum, at læknar og sjúkraystrar í samráðingum um teirra lønir siga, at sjúkrahúsini skulu hava so og so stórar játtanir. Og tað vildi verið púra burturvið. Er man farin í verkfall uppá hesar fortreytir, so hevur hetta verkfallið vánalig útlit til at verða avblást sigur løgmaður, sum annars mælir Lærarafelagnum til at seta seg við samráðingarborðið og samráðast um løn hjá lærarunum. Tað er tað tað heila snýr seg um. Og tað eru bæði Fíggjarmálastýrið og Undirvísingar- og Mentamálastýrið altíð til reiðar til leggur løgmaður aftrat.

Málið um broytingar í fólkaskúlalógini og um at tað ber til innan fyri tann játtaða karmin at fáa tað ígjøgnum heldur hann er ein politiskur spurningur millum landsstýrið og løgtingið og ikki millum landsstýrið og Lærarafelagið.

Løgmaður vísir á, at landsstýrið fer ikki at leggja seg út í samráðingarrættin hjá fakfeløgunum. Hann viðgongur tó, at eitt verkfall er altíð lemjandi fyri samfelagið.

-Man eigur ikki góðtaka at hava arbeiðssteðgir og má tí gera alt fyri at sleppa undan teimum. Hinvegin ber ikki til at brúka verkfalsvápnið til annað enn tað, ið liggur í sáttmálunum um lønarviðurskiftini hjá limunum. Kemur man ikki uppá aðrar tankar so beri eg ótta fyri, at hetta kann gerast eitt drúgvt verkfall við óbótaligum skaða fyri tað unga fólkið.

-Eg havi einki ímóti, at Føroyar Lærarafelag fer í verkfall í sambandi við síni lønarviðurskiftini, men tað kann ikki tengja játtanarspurningin í løgtinginum upp í eitt krav í hesum sáttmálasamráðingunum. Tað er burturvið. Málið er ógvuliga prinsipielt. Vit eru vit at upploysa samfelagið við slíkum krøvum, og tí mæla eg fólkunum til at fara aftur til samráðingarborðið.

Uppá fyrispurning um tað ikki er beinharði fíggjarpolitikkurin hjá landsstýrinum, sum er orsøkin til, at nógvir stovnar í samfelagnum - harímillum skúlaverkið - ikki kunnu virka eftir ætlan sigur løgmaður, at tað er púra givið, at um tað, sum nú liggur á kistubotni í landskassanum fer út í økta nýtslu, so eru vit alt fyri eitt aftur í 80-unum.

-Er tað nakað, sum politikarar hava eina skyldu at røkja, so er tað at skipa so fyri, at vit fáa eitt so trygt samfelag uppá longri sikt sum gjørligt. Og tá má man ansa eftir ikki at hava tey so ræðuligu sveiggini, sum vit hava upplivað í búskapinum. Tí vil eg mæla Lærarafelagnum til at taka við teimum 6,5% sum lønarhækkingin liggur á og fara aftur til arbeiðis. Eftir tað kann man so taka ein dialog við Undirvísingar- og Mentamálastýrið um á hvønn hátt og í hvørjum tempo man setir í verk teir ymsu tættirnar í fólkaskúlalógini.

Løgmaður vísir á, at talan er um eina rammulóg og sum kann setast í gildi við tí ferð, sum man nú einaferð hevur fíggjarliga orku og menniskjaligar ressursir til. Og hann vil fegin enn einaferð undirstrika, at hetta er ikki eitt mál millum Fíggjarmálstýrið og Lærarafelagið í aktuellu sáttmálasamráðingum um løn.

Løgmaður metir tí verkfallið vera heilt við síðuna av, tá partarnir eru samdir um lønina.

